# Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

# MUGU VÍSA HUGSJÓN Í VERKI

Tað var ein samd fíggjarnevnd, sum mikudagin legði fram álit um fíggjarlóg, sum løgtingið skundaði ígjøgnum sama dag. Tað tykir margháttligt, at tingfólk fuska tað størsta málið av øllum ígjøgnum uttan tingviðgerð, tá hugsað verður um, at sama løgting fáar dagar frammanundan brúkti nógva tíð at umrøða, um inngongdin til Rúsuna skal vera saman við øðrum handlum ella ikki.

Hetta sigur helst nakað um arbeiðslagið. Vit kunnu gita, um hetta er tí, at tingfólk eru troytt og vilja hava jólafrí, ella um orsøkin er, at tess skjótari tey fáa hurrað málið ígjøgnum uttan spurningar, tess lættari er tað at fáa málið samtykt, tí eingin fær stundir at seta spurningar, sum kunnu draga málið út ella fáa tað at detta sundur.

Vit skrivaðu á hesum stað, at Javnaðarflokkurin hevði spent bogan so nógv í samgonguni seinastu dagarnar, at hann kundi ikki slaka - uttan at verða gjørdur totalt til láturs. Nú kenna vit ikki tilgongdina í fíggjarnevndini, men eftir øllum at døma hevur flokkurin vunnið ljóð fyri fleiri av sínum hjartamálum.

Eitt av hesum málum var lønarafturbering til almanna-, heilsu- og skúlaøkið. Her vórðu frontarnir settir hart upp, ikki minst av formanni Javnaðarfloksins, sum eisini er fíggjarmálaráðharri, sum gjørdi greitt undir samráðingunum, at lønarhækking fór at føra til uppsagnir. Men hetta broytti fíggjarnevndin. Sama var við javningini av pensjónum upp á eitt prosent, eins og broytingar eisini vórðu gjørdar soleiðis, at heimið til sinnisveik í Vági verður klárt at taka í nýtslu, sum ætlað.

Fíggjarnevndin vrakaði eisini ætlanina hjá landsstýrinum at hækka avgjøld á brenniolju til sethús. Uppskotið um at lækka mjólkastuðulin var eisini broytt, eins og uppskotið um at leggja umhvørvisgjøld á flogfør og skip eisini varð vrakað.

Fíggjarkarmurin var, at hallið fyri 2011 kundi í mesta lagið vera 599,9 milliónir. Hetta broytti nevndin eisini soleiðis, at samtykta uppskotið hevur eitt hall upp á 468 milliónir krónur. Somuleiðis er fyri fyrstu ferð



í sambandi við fíggjarlóg samtykt eitt tilfeingisgjald.

Ultimatumið frá Javnaðarflokkinum til løgmann framman undan fíggjarlógarviðgerðini var annaðhvørt *»at reka fyrilitarleysan borgarligan sparipolitikk saman við Fólkaflokkinum ella at taka neyðug stig til at tryggja føroyska vælferðarsamfelagið saman við Javnaðarflokkinum.«*

Um »borgarliga mjørkatámið«, sum Javnaðarflokkurin hevur verið huldur í, kámast, ella um flokkurin er við at læra seg at siga, hvar skápið skal standa - kunnu vit kjakast um. Men eyðsæð er, at skal flokkurin vinna sær undirtøku aftur, so má hann vísa sína hugsjón í verki við politiskum úrslitum.

**»» Kanska tey læra seg at siga, hvar skápið skal standa**



# Ungdómshús í Kollafirði

Tórshavnar kommuna hevur samtykt at innrætta loftið í ítróttarhøllini í Kollafirði til ungdómshús fyri hálvaaðru millión krónur.

- Tað er ein góð íløga at innrætta loftið í ítróttarhøllini í Kollafirði til ungdómshús, sigur Levi Mørk, býráðslimur. Umframt at vera býráðslimur, so er Levi Mørk eisini leiðari í frítíðarskúlanum í Hoyvík, sum eisini hýsir Klubb 188, sum er ungdómshúsið í Hoyvík, sum nú eisini er komið í fasta legu við játtan frá býráðnum.

Levi Mørk sigur, at ætlanin er, at til ungdómshúsið í Kollafirði er liðugt, skulu kollfirðingar kunna brúka ungdómshúsið í Hoyvík. Bussur skal koyra millum Kollafjørð og Hoyvík, eitt nú leygarkvøld, tá opið er.

- Ætlanin er eisini, at ungdómshúsini hjá Tórshavnar kommunu skulu skipa fyri dansi upp á skift í Dansifrøi, og tað byrjar í januar komandi, sigur Levi Mørk.

## Ring jól hjá summum

Tað er ikki øll, sum hava tað líka gott á jólum.

Jólini er hátíðin, har hugnin er í hásæti, men sambært vakthavandi á politistøðini í Havn so eru tað ongantíð so nógv ólukkulig fólk sum ringja til løgregluna, sum upp undir jól og á jólum.

Summi eru einsamøll eftir sundurskilnað, og onnur hava onkrar sorgir antin av rúsdrekkatrupulleikum ella rúsevnismisnýtslu. Tað er heldur ikki óhugsandi, at summi av hesum fólkum eru illa fyri fíggjarliga, nú so nógv fólk hava mist arbeiði.

Tá ið fólk soleiðis ringja til politið, roynir politisturin at práta við tey, og metir politisturin, at fólkunum tørvar hjálp, ringir hann til lækna og kanska eisini til avvarðandi fyri at veita viðkomandi besta stuðulin ella hjálpina.



**»» Eitt skrivihús er í Vestmanna**

FRITS JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 17



**»» Kanningarstjóri á psykiatriskan depil**

HENRIK OLD
KJAK Á SÍÐU 18



# Innflyta vørur sum jólagávur

Eftirlitsfólk hjá TAKS finna javnan millum postpakkarnar vørur, sum fólk royna at innflyta, uttan at gjalda røttu avgjøldini. Tá er ofta ikki samsvar millum fráboðanina uttan á postpakkanum og so innihaldið í pakkanum.

Í seinastuni eru eftirlitsfólk komin fram á fleiri pakkar, har tað uttan á pakkanum stendur, at talan er um eina gávu, sum er undir avgjaldsfría gávumarkið á kr. 700,00, men í pakkanum eru dýrar fartelefonir av slagnum Iphone 4, sum kosta fleiri túsund krónur.

Verður tú tikin fyri at innflyta vørur uttan at gjalda røttu avgjøldini, skalt tú umframt at gjalda røttu avgjøldini, eisini rinda eina bót, sum svarar til avgjøldini tvær ferðir afturat.

## Tveir fingu nevan

Tveir ungir menn vórðu í nátt fluttir á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum, eftir at bardagi hevði verið í miðbýnum í Havn. Annar hevði fingið blátt eyga og hin bløddi úr vørrini.

Politiið hevur tosað við mannin, sum sló teir báðar, og hesin er skuldsettur fyri harðskap.

Tveir aðrir vórðu skuldsettir fyri harðskap, tí teir bardust. Teir kunnu vænta sær bót.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja*
*tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*